H71-VÍF 30-30 (12-14):

# Vestmenningar mistu í Havn

**Tó at talan var um eitt gott úrslit hjá H71, so munnu bæði leikarar og viðhaldsfólk iðra seg um, at tað ikki eydnaðist at vinna, tí javnleikurin gjørdi ikki frá ella til á stigatalvuni**

HONDBÓLTUR – MENN

*Jákup Mørk*



*Vestmenningar vóru til tíðir drálandi í verjuspælinum, og hetta dugdu skjúttarnir hjá hoyvíkingum at gera sær dælt av*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í mikudagsútgávu okkara skrivaðu vit, at tað kundi meira enn so henda seg, at talan fór at gerast um ein sera javnan dyst, tá Ovasta og triðovasta liðið á stigatalvuni hittust. Eisini hóast stigamunurin teirra millum var nóg so stórur, tí onkursvegna hava dystirnir millum hesi bæði liðini lyndi at vera sera javnir. Eisini tá talan hevur verið um botn móti oddi.

Og javnt var tað eisini. Tølini tala fyri seg í so máta.

### Sovandi oddalið

Eftir at dysturin byrjaði við tøgn í ein minutt, vóru tað hoyvíkingar, sum løgdu nógv betri út. Ikki endiliga tí at spælið frá teirra síðu var so øgiliga sannførandi, men heldur tí VÍF hesa fyrstu løtuna tóktist at snorksova. Í verjupartinum lótu teir vandamiklu skjúttarnar hjá heimaliðnum sleppa alt ov væl, og tá Levi Nybo samstundis hevði fleiri góðar bjargingar hinumegin, tók munurin millum liðini beinan vegin at vaksa.

VÍF venjarin, Páll Poulsen, tók tí hampuliga tíðliga eitt time-out, sum hann samstundis nýtti til at gera fleiri broytingar á liðnum. Bæði Piti Negru og Daniel Rápa komu á vøllin. Ingi Olsen varð mest sum fluttur á vinstra vong eina løtu, og spakuliga raknaðu vestmenningar við. Tóku seg somikið inn á hoyvíkingar, at nervarnir tóktist at nerva heimaliðið somikið nógv, at teir ikki so mikið sum fingið gagnnýtt ta einu løtuna, har teir í tveir minuttir spældu seks móti fýra úti á vøllinum. Og tá vestmenningarnir so aftur vóru fullmannaðir nýttu teir seinastu løtuna undan steðginum at skjóta fýra mál á rað.

Grundað á seinastu minuttirnar í fyrra hálvleiki gekk tosið í forhøllini mest um, at nú mundu vestmenningar fara at sópa allan iva til viks. Væl kenda álopsmaskinan tóktist at vera farin í gongd, og sum hoyvíkingar vardu seinastu løtuna, var talan nørum um reint kamikaze – sjálvmorð. Teir lógu nevnliga at kalla heilt inn ímóti málteiginum, og fáa vælvaksnu skjúttarnir hjá VÍF á hendan hátt møguleika at koma heilt inn, áðrenn skotið verður, so er ikki stórvegis, sum málverjarnir kunnu gera.

### Hoyvíkingar treiskaðust

Í øðrum hálvleiki stóð tó skjótt fast, at vestmenningar fóru ikki at renna nakran veg. Partvíst tí hoyvíkingar høvdu nýtt steðgin til skipa verjuna nakað betri, og ikki minst tí Bjarni Wardum nú veruliga setti ferð á. Tað kundi nærum vera tað sama, hvussu vestmenningar royndu at verja fyri, tá ársins álopsleikari í fjør gjørdi seg til. Hopp- og undirhondsskotini fóru flúgvandi inn úr øllum vinklum, og nú hómaðist aftur ein vón hjá heimaliðnum. Nakað sum áskoðararnir eisini góvu ljódliga til kennar.

VÍF hinvegin tóktist nú aftur at hava ilt við at fóta sær. Álopsspælið koyrdi uttan tær stóru variatiónirnar, og var tað ikki fyri fóðu skotini hjá Piti, kundi lættliga gingið heilt galið, men teir megnaðu tó alla tíðina at halda fast um leiðsluna. Tí var kanska væntandi, at alt fór at laga seg, soleiðis sum tað so ofta hevur gjørt hjá VÍF í ár. Í sera nógvum dystum hava teir verið lítið sannførandi, fyri síðani at spíla seg út í nakrar minuttir fram móti endanum, har alt kortini verður sett upp á pláss.

Onkra løtu í seinna hálvleiki hómaðist onkur glotti í so máta, men hvørja ferð treiskaðist heimaliðið. Teir vildu ikki geva skarvin yvir, og einar tvær ferðir stríddu teir seg aftur upp á javnt. Finnur Hannsson, sum hevði sitið á beinkinum eina góða løtu, var komin aftur á vøllin, og saman við Halgir Dahl Olesen fór hann undir at loysa Bjarna av í málskjótingini, umframt at hann eisini rúgvaði hampuliga væl í verjuni.

### Alt til onga nyttu

Alt stríðið hjá heimaliðnum tóktist tó at vera til fánýtis, tá bert tveir minuttir restaðu. Fyrst hevði stríðsmaðurin í verjuni, Olaf Vestergaard, fingið triðju útvísingina, og tá VÍF so nakað seinni økti til 30-28, mundi vónin hjá teimum flestu bresta. Men tað gjørdi hon ikki hjá leikarunum.

Kristjan Petursson, sum allan dystin var ein støðug hóttan av høgra bakki, minkaði um munin, og tá Janus M. Joensen løtu seinni javnaði, kom alt upp á kók. Tað mundi tað eisini koma, tá sami Janus beint fyri fekk eitt mál kolldømt, tí dómararnir vóru dekan ov skjótir at, døma tríggjar metrar.

VÍF royndi at nýta seinasta minuttin til eitt langt álop, sum eisini varð dríggjað við einum time-out, men tá Levi fekk fatur á seinastu skotroyndini, kundu hoyvíkingar fara í mótálop. Og tað var um reppið, at teir her avgjørdu dystin. Fyrst breyt Halgir ígjøgnum, men Bárður Nielsen fekk vart skotið yvir á stólpan, og Bárður stóð aftur fyri, tá Kristjan so royndi at smekka returin inn.

Ikki sørt, at hovyíkingar iðraðu seg um, at hesar seinastu royndirnar ikki góvu úrslit. Tó at talan var um eitt gott úrslit, so kundi javnleikurin ikki nýtast til nakað sum helst, nú stigini verða býtt í tvey. Hetta tí H71 longu hevur ein javnleik á kontini.

Tað hava vestmenningar eisini, og tí mistu bæði liðini í veruleikanum stig.

Stigamissurin móti hoyvíkingum er kanska eisini eitt tekin um, at vetrarsteðgurin, sum nú kemur, kann koma væl við hjá VÍF. Liðið, sum byrjaði árið sera sannførandi, tykist onkursvegna at motivatiónstrupulleikar í løtuni, ella er støðan bara tann, at spælið ikki koyrir nóg væl. Órógva uttan fyri vøllin, sum einki sum helst hevur við sjálvan hondbóltin at gera, hevur helst ikki bøtt um upptaktina til dystin, men hóast hetta, so kann ikki sigast, at nakar møguleiki er fokin.

Teimum restar enn ein dyst í grundspælinum. Útsetti dysturin móti Neistanum verður 9. januar, og her hava Vestmenningar, sum framvegis eru á odda í deildini, møguleika at staðfesta oddastøðuna.

### Dysturin í tølum

H71-VÍF 30-30 (12-14)

**Málskjúttar:**

**H71:** Bjarni Wardum 8(2), Kristjan Petursson 7, Halgir Dahl Olesen 5, Finnur Hansson 5(1), Hallur Danielsen 4, Janus M. Joensen 1

**VÍF:** Piti Negru 9, Sámal Joensen 5, Ingi Olsen 4, Agnar Joensen 3, Harald Bjørgvin 2, Johnny Joensen 2, Áki Olsen 2, Rógvi Nielsen 1, Ragnar Zachariasen 1, Daniel Rápa 1

**Brotskøst:** H71 4, VÍF 1

**Útvísingar:** H71 4, VÍF 3

**Dómarar úr Neistanum:** Hjalmar Petersen & Kristian Johansen. Í einstøkum førum eitt sindur ivandi, men dysturin varð tó sum heild væl leiddur.

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 11 | 11 - 0 - 0 | 310 | 196 | 114 | 22 |
| 2 | Stjørnan | 12 | 9 - 0 - 3 | 314 | 254 | 60 | 18 |
| 3 | Neistin | 11 | 7 - 0 - 4 | 238 | 210 | 28 | 14 |
| 4 | VB | 11 | 6 - 0 - 5 | 266 | 271 | -5 | 12 |
| 5 | Kyndil | 12 | 3 - 0 - 9 | 271 | 310 | -39 | 6 |
| 6 | Sóljan | 10 | 2 - 0 - 8 | 197 | 277 | -80 | 4 |
| 7 | StÍF | 11 | 1 - 0 -10 | 200 | 278 | -78 | 2 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 11 | 9 - 2 - 0 | 322 | 260 | 62 | 20 |
| 2 | Neistin | 10 | 8 - 2 - 0 | 307 | 261 | 46 | 18 |
| 3 | H71 | 12 | 5 - 2 - 5 | 329 | 334 | -5 | 12 |
| 4 | StÍF | 11 | 4 - 1 - 6 | 297 | 295 | 2 | 9 |
| 5 | Tjaldur | 11 | 3 - 2 - 6 | 270 | 303 | -33 | 8 |
| 6 | KÍF | 11 | 3 - 1 - 7 | 283 | 307 | -24 | 7 |
| 7 | Kyndil | 12 | 2 - 0 -10 | 274 | 322 | -48 | 4 |

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 21. desember til hósdagin 27. desember**

## Fía – Mykines–Sólstrondin

Táið 81 ára gamla Fía Davidsen var ung genta, droymdi hon altíð um at sleppa út í stóru verð. Hetta varð av ongum, ístaðin giftist hon til Mykinesar og kom at búgva har stóran part av lívinum. Tá hon ikki slapp til verðina, skuldi verðin koma til hennara Sum hin fyrsta í oynni fór hon undir at taka í móti fremmandafólki. Nógvir forvitnisligir gestir og filmslið hava gist hjá Fíu. Hon veit frá mongum at siga og enn síggjast spor frá gomlum kendum ferðafólkum.

Í 1972 doyr maðurin av sjúku og nakað seinni flytir Fía av oynni. Fyrst í 80-unum selur hon jørðina í Mykinesi og fyri part av hesum, keypir hon íbúð í Spania. Seinni byggir hon síni egnu hús nakað niðan frá sólstrondini í Malaga.

Endiliga slapp Fía út í stóru verð. At tað júst gjørdist Spania hevur sína egnu søgu. Vit eru saman við Fíu í Mykinesi og fara síðan suður til Sólstrondina við henni.




## Smakur er so ymiskur…

*Bergur Rasmussen ummælir:*



Onkur vil hava sukursøtan romantikk, annar kontanta sosial-realismu, hin triði vil kanska bara undirhaldast við quizzum, gekkum og lurtararnir og vit. - Og haldi eg, at teir báðir almennu loftmiðlarnir í Føroyum duga hampiliga væl at gera eina fjøltáttaða skrá, ið bæði rakar breitt og rakar støku áhugabólkarnar. Tær breiðu sendingarnar eru, sum vera man í meiriluta, men har er stundum stoff fyri tann »kræsna« lurtaran og hyggjaran.

Hendan vikan mær var litið til at ummæla miðlarnar, var einki undantak í so máta: Eitt hóskandi býti millum Tvætl & Tónleiksendingar, kjak-sendingar, upplýsandi tilfar, undirhald og 'smalar' sendingar.

Globussurin týskvøldið 11/12 var um støðuna millum ríkispartarnar, »sæð við donskum eygum« sum Leivur Hansen málbar seg, men hóast myndirnar vóru penar og bæði Høgni og Jóannes siðiliga førdu síni argument fram, so sat man aftaná við kensluni av at hava sæð enn eina av hasum donsku sendingunum um Føroyar, sum neyvan siga nøkrum av tegnum hennara hátigns nakað sum helst. - Nær tora teir at gera eina sending, sum sigur hvat danir vilja við ríkisfelagsskapinum? - Tað hevði so verið ein vinkul, sum var nýggjur!!

Tað ýddi annars í øðrvísi vinklum í filminum, sum kom seinni sama kvøld. - Naked Lunch, sum byggir á rúsevnis-skaldsøguna, sum flipparin og beat-poeturin William S. Burroughs skrivaði í 60'unum. Hesin undarligi filmur við teimum mongu scenunum við stinkandi skrivimaskinu skriðkyktum og svørtum grashoppupulvuri og Wilhelm Tell avrættingum av konufólki, var somikið forherðaður, at vaksnir menn runt um landið, sum annars hava sæð bæði eitt og annað á filmi áður, mundu kveppa seg í andstygd. - Eg gjørdi ið hvussu er! Kortini hugdi eg til liðugt var, tí okkurt í søguni hugtók meg og vakti forvitnið. – Hvørjum endar hatta við? – Og hóast filmurin stundum hevði hug at oyðileggja bæði matarlystin og sodningarlagið, so hevði eg hug at smílast, tá ið hetjan í filminum skuldi til Annexia at selja pulvurið, og frammanfyri tollarunum skeyt dámuna í høvdið, sum hann hevði roynt eftir hálvan filmin. Seinastu viðmerkingina áttu menninir í eyðkennisbúna. Við ógvusligari russiskari aksang søgdu teir: 'Welcome to Annexia! — Takk til SvF, at teir viðhvørt hætta sær at senda hesar løgnu filmarnar, sum kunnu tulkast bæði hendavegin og hinvegin.

Sendingin hjá Hilmari Jan fríggjakvøldið klokkan sjey var hinvegin góð fyri sodningina og hvørki kundi ella skuldi tulkast sum annað enn hyggeprát. Har borðreiddi vælupplagdi verturin við deiligum swing tónleiki og gestum, ið prátaðu um onnur evni enn vit vanliga kenna teir fyri. Stak hugnaligt. Eg sat tó mest og gleddi meg til Billboard bitarnir skuldu koma, men tað var tíverri ein endursending, so eg skifti yvir á sjónvarpið í staðin. Tað var jú eisini Dagur og Vika, og stuttligt var at síggja, at stóri bygningurin á vágskei hevur reist seg sum ein annar Fønix fuglur úr øskuni. Tað var jú har eg á sinni tjenti mínar fyrstu krónur, tá einaferð langsíðan síðan, tá ið verðin var so nógv øðrvísi enn hon er í dag.

Og tó, kann man spyrja, er hon tað? Men hetta er ikki rætta staðið at viðgera heimspolitikk, so tað lati eg liggja.

Leygarmorgunin, tá ið teir báðir Kári Sólstein og Tóna Tummas bjóðaðu børnunum at ringja inn til sang og prát var hæddarpunktið í hesari miðlavikuni. Sum vant høvdu ymisk børn ringt inn, runnið eftir fjalda lutinum og smáprátað eitt sindur áðrenn tey saman við vertunum báðum høvdu sungið onkran fittan barnasang, men beint áðrenn klokkan 11 ringdi níggju ára gamla Súsanna inn. Og tað var eitt upplivilsi. Sangurin hon sang var »On the first Day of Christmas« og tók gentan vertirnar á bóli við hugtakandi sanginum. – Teir sótu púra paff og lurtaðu uttan undirspæl og uttan at syngja kór. Tá ið klokkan fór av ellivu brutu teir inn og spurdu, hvussu nógv ørindi vóru eftir. - Tvey! - OK, so mugu tíðindini bíða. Og so slapp Súsanna at telja jólini liðug í hesari vøkru vísu. Og Taleban og Reyði Krossur máttu bíða eina løtu. Men tað ger ikki petti, tí vit hoyra jú um Afghanistan í heilum, men slíkur sangur er rárur. – Flott Súsanna! – Og takk til Barnaútvarpið fyri hatta átakið!

So nógv annað úr einari fjøltáttaðari miðlaviku kundi verið nevnt, men pláss er valla fyri meiri í hesum umfari, so eftir er bert at ynska øllum eini góð og gleðilig jól.

## Jólakonsert hjá Frelsunarherinum í Oslo




## Jólakonsert við manskórinum í Meinigheitshúsinum




## Hvør við sínum nevi




## Mandagsbio: Et juleminde

